Juni 2024

# Limabræv

starvsfelagið

Nr. 2/2024







## NÝGGJUR LØGFRØÐINGUR Í STARVI

Henrik Weihe Joensen byrjaði í føstum starvi sum løgfrøðingur í Starvsfelagnum í apríl. Limirnir hava tikið væl ímóti okkara dugnaliga, nýggja løgfrøðingi.

LES MEIRA UM HENRIK

## STARVSFELAGIÐ VIÐ TIL AT FÍGGJA LEIGUBÚSTAÐIR

Tryggingarfelagið LÍV, sum fakfeløgini eiga helmingin av, hevur gjørt avtalu við Bústaðir og tvær privatar fyritøkur um at lata leiguíbúðir byggja í Havn og Klaksvík.

LES UM VERKÆTLANIRNAR

## OKKARA FÓLK Á EVROPISKARI RÁÐSTEVNU

Umboð fyri Starvsfelagið vóru í farnu viku á gevandi ráðstevnu saman við fakfeløgum úr øllum Evropa. Fleiri áhugaverdar frásagnir eru á heimasíðuni.

LES FRÁSAGNIRNAR

## SAMHUGAVERKFALLIÐ, IÐ IKKI BLEIV: HUGLEIÐINGAR FRÁ FORMANNINUM

Drúgva verkfallið hjá arbeiðarafeløgunum hevði við sær, at  nevndin í Starvsfelagnum tók avgerð at fráboða samhugaverkfall fyri limir okkara, sum arbeiða hjá Posta, Føroya Tele og Vága Floghavn.

Næsta døgnið gjørdist avgerðandi fyri verkfallið og ikki sørt rokaligt við hóttanum um gerðarrættarmál og síðan semju ímillum partarnar, sum gjørdi, at verkfallið og okkara samhugaverkfall varð avblást.

LES HUGLEIÐINGARNAR





## ÁLITISFÓLKAFUNDIR Í HEYST

Álitisfólk hjá Starvsfelagnum hava sambært sáttmálanum tveir dagar árliga, har tey í vanligari arbeiðstíð kunnu luttaka á álitisfólkafundum. Eins og í fjør, hevur nevndin gjørt av, at álitisfólkafundirnir verða báðir hildnir í heyst. Vanliga verða hesir fundir hildnir í Smæruni í Havn.

Álitisfólkafundirnir verða væntandi hildnir í septembur og novembur 2024 í Smæruni. Álitisfólk fáa nærri boð frá felagnum komandi tíðina.

## NÝGGJ LIMATILBOÐ

Nógvar nýggjar avsláttaravtalur eru komnar afturat listanum av tilboðum til okkara limir seinastu tíðina. Vit halda, at okkara limir skulu fáa sum mest burturúr hvørjari krónu - serliga við kostnaðarstøðinum í løtuni.

Nýggjastu avtalurnar geva okkara limum avsláttur frá Burn Fitness, Colorama í Havn, Fønix, Jógvan Weihe, Skatefelagnum í Havn, KBI og Thomas Dam á Hálsi (Havn).

SÍ TILBOÐINI HER





## GRUNDSKEIÐ FYRI NÝGGJ ÁLITISFÓLK

Nývald álitisfólk í Starvsfelagnum vóru fyrr í mánaðanum boðin til fyrra av tveimum grundskeiðum. Hetta skeiðið varð tíverri útsett vegna verkfallið hjá arbeiðarafeløgunum.

Útsetta skeiðið verður væntandi tíðliga í heyst. Nýggj álitisfólk fáa nærri boð frá felagnum í næstum.

## HEVUR TÚ EINKI ÁLITISFÓLK?

Starvsfelagið sendir javnan kunning til limir gjøgnum álitisfólkini hjá felagnum. Um tú ert ein av teimum, ið einki álitisfólk hevur á deildini/arbeiðsplássinum, er tað týdningarmikið, at tú vendir tær til felagið og upplýsir tín teldupost. So skriva vit beinleiðis til tín, tá álitisfólk annars fáa boð frá felagnum.

Aðrir limir, sum ikki fáa kunning frá felagnum og ynskja tað, eru somuleiðis vælkomnir at venda sær til okkara.





# HEILSAN FRÁ FORMANNINUM

Góði limur,

Summarið er í hondum, summi okkara eru longu farin í feriu og onnur fara skjótt. Starvsfelagið fer ikki í feriu fyrr enn 15. juli, tá skrivstovan letur aftur í tríggjar vikur.

**Verkafeløgini í verkfalli**

Seinasta tíðin hevur verið rokalig við drúgvum verkfalli á privata arbeiðsmarknaðinum. Vit hava verið noydd til at laga okkum til umstøðurnar, tí stórar avmarkingar hava verið á matvørum, brennievni og øðrum tænastum, so sum innflutningi av vørum, ruskinnsavning og buss- og hýruvognskoyring. Einki reinhald hevur verið á bygd og í býi, og stórur partur av starvsfólkunum í fiski- og alivinnuni hevur ikki verið til arbeiðis, umframt at byggivinnan varð eisini hart rakt.

Eftir at verkafeløgini høvdu verið í verkfalli í góðar tríggjar vikur, gjørdi nevndin í Starvsfelagnum av, at nú mátti felagið vísa verkafeløgunum sín stuðul í verki og ikki bara við orðum og lýsingum.
Longu áðrenn semingsroyndin slitnaði fríggjakvøldið 7. juni, hevði nevndin avgjørt, at felagið skuldi fara í samhugaverkfall, um so var, at tað ikki bar á mál hjá verkafeløgunum. Tí vóru vit skjót at lýsa samhugaverkfall longu tíðliga leygardagin á sama sáttmálaøki, sum stríðandi partarnir eru, mótvegis Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsinum.

Sum flestu kunnugt, varð samhugaverkfallið avlýst, eftir at partarnir sunnukvøldið 9. juni undirskrivaðu eina nýggja tvey ára semju.
Vit fegnast saman við verkafeløgunum um semjuna, sum gevur eina lønarhækkan á 13% yvir komandi tvey árini. Sagt verður, at við hesi semjuni er keypiorkan hjá verkafólkunum á sama støði, sum áðrenn inflatiónina, sum rakti okkum undir og eftir korona farsóttina og eftir at ørvitisknokkurin Putin leyp á Ukraina.

At Starvsfelagið velur so dyggiliga at stuðla verkafeløgunum, er fyri okkum púra sjálvsagt. Ein og hvør konflikt á arbeiðsmarknaðinum krevur stuðul frá øðrum fakfeløgum, tí saman standa vit sterk.
Einsamøll er tað trupult at standa ímóti sterku arbeiðsgevarasíðuni, sum stendur saman óansæð hvat.
Tí ein konflikt sum hendan snýr seg um at standa saman í solidariteti mótvegis hvørjum øðrum.
Vit vita eisini, at úrslitið av hesi semjuni so ella so ávirkar úrslitið hjá okkum, tá ið vit skulu til samráðingarborðið vegna limir okkara seinni í heyst og um árskiftið.

Saman eru vit sterk. Øksl móti øksl, er tú sterkari.

Framhald á næstu síðu...

# HEILSAN FRÁ FORMANNINUM

...FRAMHALD



**Sáttmálasamráðingar 2024**

Nevndin hevur á fleiri nevndarfundum seinastu mánaðarnar viðgjørt komandi sáttmálasamráðingar. Tað er ikki til at fara skeivur av, at hesar samráðingar verða helst líka truplar, sum tær vit kenna, og helst ikki lættari enn flestu aðrar samráðingar hava verið hjá øðrum feløgunum.

Seinastu árini hava sáttmálasamráðingarnar verið merktar av, at Semingsstovnurin so at siga altíð er blivin partur av samráðingunum, tí arbeiðsgevarasíðan er púrasta læst føst í, at løntakarin helst einki skal hava í lønarhækkan yvirhøvur.

Hetta ger, at tað er serstakliga trupult hjá fakfeløgum at koma framat samráðingarborðinum, tí flestu samráðingar enda við seming og onkrar enntá við verkfalli.
Eg vil enntá fara so langt, og siga, at viljin til at síggja tørvin hjá løntakaranum fyri eini rímuligari lønarinntøku, eini inntøku ein kann liva av, er ikki til staðar.

Tað eigur og skal verða ein náttúrligur rættur hjá einhvørjum at hava eina lønarinntøku, sum gevur einum møguleika fyri at kunna svara fyri hvørjum sínum, og sum samstundis gevur mat á borðið.
Nevndin hevur tí tikið avgerð um, at komandi lønarsamráðingar snúgva seg um at fáa so stóra lønarhækking sum møguligt á lønarkontuna.

Tað merkir, at nevndin longu nú hevur tikið avgerð um, at allur karmurin verður brúktur til lønarhækkingar og møguliga onkrar justeringar og ikki til annan kostnað av sáttmálabroytingum.
Tað hevur við sær, at vit fyri fyrstu ferð, sum eg veit um, ikki fara at biðja álitisfólkini um at samla inn krøv og ynskir frá limum okkara til komandi sáttmálasamráðingar.

Tíðin, vit hava verið og enn eru í, krevur, at vit skulu tryggja limum okkara keypiorkuna aftur, og hon skal helst ikki verða minni enn hon var, áðrenn inflatiónin fór til himmals.

Tað er ikki til at siga, hvat úrslitið av komandi lønarsamráðing verður, tað má tíðin vísa. Men tað skal eingin ivi vera um, at okkara stríð skal ikki liggja eftir og vit fara heilt hartil, sum tað er neyðugt, so limir okkara fáa ta neyðugu lønarhækkingina, so vit aftur kunnu svara fyri dagin og vegin.

Eg vil við hesum nýta høvið til at ynskja øllum eitt gott summar.

**Súni Selfoss, formaður**

# STARVSFELAGIÐ FER Í SUMMARFRÍ

Sum vant verður skrivstova felagsins stongd í 3 vikur í summar, meðan vit í umsitingini halda summarfrí.

Skrivstovan steingir fríggjadagin 12. juli kl. 15 og letur upp aftur mánamorgunin 5. august kl. 9.

Í summarfrítíðini svarar telefonin ikki, men eru átrokandi boð, ber til at skriva til starvsfelag@starvsfelag.fo og vit venda aftur sum skjótast.

starvsfelagið

